

*Kvinnurnar hjá Kyndli hava fingið eina góða byrjan upp á kappingarárið. Leygardagin vitjaði Sóljan í Havn, og tann dystin vann Kyndil*

*Mynd: Álvur Haraldsen*

# Fleiri tættir dystir

**Tríggir dystir vóru í Sunset-kappingini hjá kvinnum um vikuskiftið, og í tveimum av førunum var talan um tættar dystir**

HONDBÓLTUR
*Terji Nielsen*
*terji@sosialurin.fo*

Á Skála tók StíF móti Neistanum úr Havn. Neistin hevur fingið eina stak góða byrjan upp á kappingarárið, og havnarliðið sigraði eisini á Skála, men tað var ikki eins lætt, sum høvdu fleiri annars kanska høvdu væntað.

### Avgerðin fall móti endanum

Neistin vann dystin á Skála 23-20, eftir at tað hevði staðið á jøvnum 12-12 í hálvleikinum. Neistin var á odda í fleiri førum í seinna hálvleiki, men tað eydnaðist tó hvørja ferð vertunum at koma upp á javnt. Tá ið fimm minuttir vóru eftir at leika, javnaði StíF til 20-20, men seinasu fimm minuttirnar eydnaðist tað Neistanum at skjóta trý mál, meðan heimaliðið einki fekk, og tí gjørdist endaliga úrslitið 23-20 til Neistan.

Neistaliðið er styrkt í ár í mun til í fjør við tað, at Nicoleta Radu Hansen og Annika Ljósstein eru komnar í hópin úr ávíkavist Søljuni og Stjørnuni. Hinvegni hevur liðið mist ein profil í Marjun Tróndarson, ið er farin til Danmarkar í lestrarørindum.

### Stjørnan gjørdi sína skyldu

Steypavinnararnir úr Stjørnuni gjørdu sína skyldu, tá ið teir sunnudagin høvdu vitjan av VÍF. Stjørnan vann dystin móti vestmannakvinnum 25-19. Í hálvleikinum var Stjørnan á odda 11-10.

Sum tølini eisini prógva, so fylgdu gestirnir úr Vestmanna væl við fyri steðgin og vóru fleiri ferðir á odda, men eftir steðgin tó Stjørnan sær um reiggj, og heimaliðið fór beinan vegin frá gestunum.

### Tvey stig til Kyndil

Leygardagin tók Kyndil móti Søljuni í høllini á Hálsi í Havn. Kyndil sær út til at standa seg betur í ár enn í fjør, og liðið hevur longu fingið nøkur stig til høldar. Søljan taldist í fjør millum teirra, sum stríddust um heiðursmerki, men í ár hevur liðið mist nakrar av stuðlunum á liðnum. Nicoleta Radu Hansen er farin í Neistanum, meðan tvær aðrar, Lina Andriulyte og málverjin Kristina Grikšaite nú eru í Kyndli.

Dysturin leygardagin var tættur og spennandi. Í fyrra hálvleiki gekk rættuliga javnt á, men eitt skifti var Søljan á odda við fýra málum 11-7, men seinastu løtuna av hálvleikinum fekk heimaliðið tó strítt seg upp á javnleik 11-11.

Eftir steðgin byrjaði Kyndil betur og legði seg á odda við fýra málum, og tað gloppið gjørdist ov stórt hjá Søljuni at heinta inn aftur, og tí fekk Kyndil bæði stigini fyri 21-19 sigurin.

### StÍF-Neistin 20-23 (12-12)

**StÍF:** Rebekka Justinussen 12(4), Ninna Johansen 3, Guðrun Ólavsdóttir 3, Poula D. Olsen 1, Rósa Johansen 1
**Neistin:** Nicoleta Radu Hansen 7, Annika Ljósstein 5(1), Mildrið Jacobsen 4, Annika Thomsen 3, Súna Mørk 2(1), Birita Wardum 1, Rakul Augustinussen 1
**Útvísingar:** StÍF 4, Neistin 2
**Dómarar:** Hartvig Joensen og Kári Hansen

### Stjørnan-VÍF 25-19(11-10)

**Stjørnan:** Alina Olaru 10(5), Bára Skaale Klakstein 4, Una Olsen 4, Anna Kristina Samson 3, Louisa Andreasen 2, Katarina Stjepanov 2
**VÍF:** Ioana Rapa 7(4), Jacklin Durhuus 4, Heidi Joensen 4, Torgunn Johansen 2, Fríða Marjunardóttir 1, Alis Høghamar 1
**Útvísingar:** Stjørnan 2, VÍF 5
**Dómarar:** Eyðun Samuelsen og Andreas F. Hansen

### Kyndil-Søljan 21-19(11-11)

**Kyndil:** Jórun Ludvig 5, Eyðritt Andreasen 4, Lina Andriulyte 4(2), Súsanna Petersen 3, Linda Weihe 3, Randi S. Wardum 2
**Søljan:** Hertha Simonsen 6, Sólja Jóanisdóttir 6(4), Heidi Maria Akselsen 4, Irdi Mikkelsen 1, Fía Selma Nielsen 1, Louisa Niclasen 1
**Útvísingar:** Kyndil 2, Søljan 6
**Dómarar:** Hallur Danielsen og Petur Skeel Dahl

# Hoyvíkingar eru væl fyri

**H71 hevur fingið eina góða byrjan upp á kappingarárið undir nýggja venjaranum Hannis Wardum. Sunnudagin hevði H71 vitjan av Neistanum, og hoyvíkingar vunnu sannførandi. Eisini Kyndil vann trygt í vikuskiftinum**

ATLANTIC AIRWAYS-KAPPINGIN
*Terji Nielsen*
*terji@sosialurin.fo*

H71 læt ongan iva verða um, hvat var betra liðið, tá ið Neistin vitjaði. Hóast neistamenn fingu betru byrjanina upp á dystin, so tóku hoyvíkingar yvir móti endanum av fyrra hálvleiki, og eftir steðgin var eingin ivi um, hvat var betra liðið.

### Halgir og Jakob

Seinnu árini hava avrikini hjá H71 verið sera nógv tengd at, hvussu liðskiparin, Halgir Dahl Olesen, hevur staðið seg. Ábyrgdin á hansara herðum hevur verið stór, men í ár hava hoyvíkingar fingið tilgongd av Jakob Jónsson úr Kyndli, og tað tykist hava lætt um trýstið á Halgir.

Teir báðir, Halgir og Jakob, vóru heilt stóru málslúkarnir hjá H71 sunnudagin og fingu tilsamans 20 av teimum 34 málunum hjá hoyvíkingum ídystinum.

Neistin hevur mist nakrar av profilunum frá í fjør, og sum heild kann sigast, at talan er um eina ógvuliga unga manning, ið skal bera liðið í ár.

### Kyndil koyrir væl

Hin dysturin í Atlantic Airways-kappingini í vikuskiftinum var millum Kyndil og KÍF, og tann dystin vunnu kyndilsmenn 28-22.

Kyndil legði seg á odda beinan vegin, og hóast tað einans vóru tvey mál á muni í steðginum, so var ongantíð nakar ivi um, hvør fór avstað við sigrinum.

Við úrslitunum um vikuskiftið hava bæði Kyndil og H71 ognað sær fimm av seks møguligum stigum í kappingarbyrjanini, og liðini tykjast verða rættuliga væl fyri.

### H71-Neistin 34-25(15-13)

**H71:** Halgir Dahl Olesen 11(3), Jakob Jónsson 9, Piti Negru 5, Johnny Durhuus 3, Tróndur Vatnhamar 3, Heini Bentsen 2, Bjarni Sørensen 1
**Neistin:** Blagoje Buha 7, Birgir Poulsen 5, Tróndur Kragesteen 4, Helgi Michelsen 3, Áki Mørk 3, Jón Clementsen 1, Dann Thorleifsson 1, Jón Ludvig 1
**Útvísingar:** H71 2, Neistin 5
**Diskvalifikatión:** H71 1
**Dómarar:** Kristian og Karsten Joensen

### Kyndil-KÍF 28-22(13-11)

**Kyndil:** Rókur Akralíð 7, Hans Áki Dal-Christiansen 6, Høgni Klein 5(3), Marius Joensen 3, Ken Zachariassen 3, Janus Einar Sørensen 3, Hjalti M. Jakobsen 1
**KÍF:** Karl Johan Djurhuus 6(3), Petur Martin Poulsen 4, Suni Davidsen 4, Arnbjørn Hansen 2, Gert Hansen 2, Mirko Milinkovic 2, Rógvi Weyhe 2
**Útvísingar:** Kyndil 6, KÍF 4
**Dómarar:** Hallur Danielsen og Petur Skeel Dahl